


www.oljan.fo

**Jan Müller** 11 - 03 - 2013

# Tvey leitiloyvi eftir olju latin inn aftur

Herfyri vóru tilsamans átta leitiloyvi á føroyska landgrunninum. Hesi eru nú vorðin til seks, eftir at Valiant Petroleum og Statoil hava latið inn aftur til myndugleikarnar tvey av sínum loyvum. Feløgini eru tó framvegis virkin á landgrunninum. Jarðfeingi boðar frá, at Valiant Petroleum hevur latið leitiloyvi nr. 013 aftur frá 13. januar 2013 at rokna. Loyvið varð latið í 2005 til Geysir Petroleum og Atlantic Petroleum. Geysir Petroleum varð yvirtikið av Valiant Petroleum í 2011. Valiant Petroleum var nú einasti loyvishavari. Statoil Færøyene AS hevur latið leitiloyvi nr. 010 aftur frá 1. mars 2013 at rokna. Loyvið varð latið í 2005. Statoil Færøyene var einasti loyvishavari. Dátur eru savnaðar yvir økini, og kanningar eru gjørdar, men ongar boringar framdar. Innsavnaðu dáturnar verða leysgivnar av Jarðfeingi, eftir at tvey ára trúnaðarskeiðið fyri tær er runnið. Onnur áhugað kunnu nú frítt søkja um leitiloyvi á økjunum skrivar Jarðfeingi á síni heimasíðu. Í dag eru framvegis sjey oljufeløg virkin á landgrunninum. Tey eru Statoil, Dong, OMV, Valiant, ExxonMobil, Atlantic Petroleum og Faroe Petroleum, sum tó hevur eitt forkanningarloyvi. 20. mars gongur freistin út hjá oljufeløgum at søkja um eitt øki í landssyningshorninum á landgrunninum, sum er vorðið leyst at søkja, eftir at eitt ella fleiri oljufeløg longu hava søkt um hetta økið sum part av "open door" skipanini.